# MINNINGARORÐ UM FINNUR OLSEN



12. februar 2002 komu deyðsboðini av Finni Olsen, fyrrverandi húsavørði í Norðurlandahúsinum. Finnur varð bert 66 ára gamal, nú hann doyði.

Finnur kom í starv í Norðurlandahúsinum í 1987, og starvaðist har til í fjør, tá hann gjørdi av at leggja frá sær. Hann var væl kendur og væl umtóktur – bæði av teimum, sum vitjaðu í húsinum og av okkum starvsfeløgum.

Øll, sum hava havt tilknýti til Norðurlandahúsið hava góð minnir um Finn. Hann dugdi væl at taka ímóti fólki, og dugdi sera væl at vísa øllum til rættis. Hann tók sær tíð at tosa við fólk, var fryntligur, trúðfastur, hevði myndugleika, men kundi eisini vera bersøgin og hittinorðaður um somu tíð.

Finnur hevði góð evni til at skipa fyri, frá tí tiltøk vórðu sett á skránna, til tey vórðu framd. Hann dugdi væl at leggja alt til rættis, og at samansjóða alt frá handverki til mentunarliga innihaldið í tiltøkunum, sum ofta kundu verða dag um dag. Hann var góður við Norðurlandahúsið, sum um tað var hansara egna, og starvið fylti nógv í hansara lívi, tey árini, hann arbeiddi har.

Finnur var útbúgvin snikkari, men hevði stóran áhuga fyri tí mentunarliga, sum starv hansara í Norðurlandahúsinum bar í sær. Hann hevði serlig evni til at loysa tær mongu ymisku uppgávurnar, sum tey sera ymisku tiltøkini í Norðurlandahúsinum kravdu.

Starvsfólkið í Norðurlandahúsinum hevur saknað Finnur, síðan hann legði frá sær í fjør. Hann gleddi seg til at njóta tíðina sum pensjónistur, men honum untist bert eitt ár í hesum parti av lívskeiði hansara. Hann gjørdist álvarsliga sjúkur, og nú vórðu boð eftir honum.

Familjan hevur hevur mist ein góðan mann, pápa, verpápa og abba, og vit í Norðurlandahúsinum vilja sýna okkara stóru samkenslu við tykkum.

Finnur. Takk fyri góð minnir.

***Stjóri og starvsfólk í Norðurlandahúsinum.***

# Hans Tórgarð fekk herðaklappið



*Hans Tórgarð fekk "Ársins herðaklapp" frá Leikpalli Føroya, Grækarismessudag*

**Grækarismessudag varð "Ársins herðaklapp" handað á øðrum sinni. Leikpallur Føroya letur herðaklappið, sum er peningaupphædd áljóðandi 6000 krónur, ið er ætlaðaðar, sum ískoyti til ferð í útheimin at hyggja eftir sjónleiki**

HERÐAKLAPP
*Ingrid Bjarnastein*

Hans Tórgarð er 32 ára gamal, og kenna vit hann mest frá Grímu. Hann bæði skrivar og spælir sjónleik, og er hann nú á veg uttanlands við leikinum Macbeth, saman við øðrum sjónleikarum.

Herðaklappið var latið Hans Tórgarð fyri leiklistarligt fjølbroytni, kreativitet og framúr góð leiklistarlig avrik. Grundgevingin var soljóðandi:

" Hans Tórgarð hevur hóast ungur av árum og stutta starvstíð, fingið merkisvert nógv frá hondini, sum karakterleikari, leikritaskrivari og leikstjóri. Hann er íverksetarin, sum gevur øðrum sjónleikarum íblástur, samstundis sum hann í leiklutum sínum megnar at geva áskoðaranum upplivingar, sum víðka um sjónarringin hjá tí einstaka, fær hann at flyta mørk og skilja margfalnu litbrigdini í menniskjasligum samskifti. Hans Tórgarð læsir seg ikki fastan í ávísari leiklistagrein, men er fjølbroyttur í evnisvali. Hann tekur listarligu uppgávurnar í álvara og útinnir tær eins hegnisliga, antin framførslan er fyri børnum ella tilkomnum áskoðarum. Fjølbroyhtni sermerkir eisini hansara virksemi, tá ið hann skrivar leikir, setir upp og framførir, bæði í einmansleiki og saman við øðrum sjónleikarum. Hansara íkast til leiklistina gevur vón um framhaldandi menning innan sjónleikavirksemið í Føroyum."

Leikpallur Føroya sigur, at herðaklappið kann verða latið einstaklingi ella felag, sum á ein hvønn hátt hevur skarað framúr í farna árið á leiklistarliga økinum. Ein nevnd við tveimum limum fyri Leikpall Føroya og einum limi úr Føroya Blaðmannafelag er sett fyri at avgera, hvør skal fáa heiðurin av ársins herðaklappi.

Herðaklappið varð latið fyri fyrstu ferð í fjør. Tá var tað Lina Larsen, sum fekk hesa fyrstu føroysku sjónleikaviðurkenning nakrantíð.

# Kaupthing gott ársúrslti

**Kaupthing Føroyar hevði í fjør eitt yvirskot áljóðandi 1 mió krónur. Stjórin fegnast um gongdina**

ÁRSROKNSKAPUR
*Heri á Rógvi*

Í ársroknskapinum fyri Kaupthin Føroyar stendur at lesa, at fyritøkan fyri árið 2001 hevði eitt yvirskot áljóðandi 1,013 mió kr. Hetta fegnast stjórin í Kaupthing, Peter Holm, eisini um. Nevndin góðkendi saman við aðalfundinum roknskapin hin 6. februar.

–Vit eru enn eitt rættiliga nýtt felag. Í londum rundanum okkum er tað vanligt, at nýstovnaði feløg hava eitt tveysifrað millióna undirskot eftir so stutta livitíð. So vit eru ógvuliga fegnir, sigur Peter Holm.

Tað var 1. mars 2001, at virksemið hjá Kaupthing Føroyar formliga fór ígongd. Tá kastaðu Føroya Sparikassi og Kaupthing Bank saman í Kaupthing Føroyar, Føroya Virðisbrævamarknaður. Frammanundan hevði Kaupthing Bank virkað í Føroyum, men roynt varð heldur at virkað eftir hesum nýggja leistinum. Virksemið hjá Kaupthing Føroyar snýr seg fyrst og fremst um virðisbrøv, t.e. keyp og søla, ráðgeving og ognarrøkt.

–Hóast serliga partabrævamarknaðirnir sum heild royndust svikaligir í 2001, var talan um ein lutfallsliga stóran vøkstur í virðisbrævaíløgum gjøgnum Kaupthing Føroyar farna árið. Við serligu umstøðunum í huga er hetta nøktandi. 31. desember 2001 umsat Kaupthing Føroyar virðisbrævaíløgur fyri viðskiftafólk fyri eitt virði á umleið 1,1 mia. kr. Størsti parturin av hesum viðisbrævaíløgum, og samstundis eisini størsti parturin av vøkstrinum í farna árinum, eru íløgur í donsk stats- og realkredittlánsbrøv, skrivar Kaupthing m.a. í ársfrágreiðingini.



*Kaupthing Føroyar hevði eitt yvir um milliónina í 2001.*

## Brot úr virksemi Hans Tórgarðs

– 1986: Fyrstu fer á palli í heimbygdini Kvívík
– 1990: Fyrstu fer á palli í Havn. Gríma: "7. boð – stjal eitt sindur minni" Eftir Dario Fo
– 21 ára gamal gjørdi hann pallmynd til sjónleikin "Kraddarin", fekk seinni leiklut í leikinum
– 1991: Gøtusjónleikurin "Gandaferðin"
– 1992: Høvuðsleiklutin í íslendska leikinum "Ferðin til heimsin enda"
– 1992: Barnasjónleikurin "Hurlivasi í Lítluvík"
– 1992: Tveymansleikurin "Liva tikarar í Kongo", leikur um AIDS saman við Hilmar Joensen
– 1993: "Glataðu spælimenninir" eftir William Heinesen, hevði leiklutin sum Orfeus
– 1993: Høvuðsleiklutin í sjónleikinum "Royndin" – spælir Nólsoyar Páll
– 1994: Russiski leikurin "Góða Jelena"
– 1995: fór Hans til Finlands at fáa sær sjónleikaraútbúgving
– 1996: "Eldførið"
– 1998: Leikstjórnað "Rumbul í húsi"
– 1999: Prógv frá sjónleikaraskúla í Helsinki
– 2000: "Móður Sjeystjørna" eftir William Heinesen
– 2000: Høvuðsleiklutin í "Krypilin úr Inishman"
– 2000: Umsetti og framførdi einmansleikin "Óndskapurin"
– 2001: "Eitur nakað land Week-end?" eftir Jóanis Nielsen
– 2001: Hans og Súsanna Tórgarð skrivaðu leikin "Fótur í hosu", sum Hans leikstjórnaði
– 2002: "Macbeth", har Hans spælir Macbeth sjálvur






Nú kunnu øll keypa sær ein bita av Norðurlondum. Íløgufeløg geva smásparárum møguleika at gera íløgur og fáa teir fyrimunir, sum stórir íleggjarar hava.

**Norrøn partabrøv**
Eitt nýtt íløgufelag er »Norrøn partabrøv«. Her ganga fólk saman um at gera íløgur í stór og viðurkend norðurlendsk partafeløg.

Dentur verður lagdur á at spreiða íløguna við at seta pening breitt í norðurlendskar vinnugreinar. Tað ger íløguna tryggari.

**Lánsbrøv í donskum krónum**
Tú kanst eisini gera íløgur í felagið »Lánsbrøv í donskum krónum«. Íløgurnar verða gjørdar í lánsbrøv, sum eru útgivin av danska statinum og øðrum útgevarum við høgum kredittvirði. Lánsbrøv eru tryggari íløga enn partabrøv, men partabrøv kasta meira av sær.

Íløguprógvini kunnu keypast hjá Kaupthing Føroyum ella Føroya Sparikassa.

FØROYA SPARIKASSI
Tel 34 80 00 • Fax 34 83 48 • www.sparikassin.fo

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag
Tinghúsvegur 14 • FO-110 Tórshavn • tel. 35 15 00 • fax 35 15 01 • www.kaupthing.fo